## Súkklur

**TIL SØLU**
Ein dreingja súkla 20" og ein harra súkla til sølu fyri 250,- pr stk.
*Tel. 315922 / 277867*

**BANACROSS**
Yamaha YZ 250cc banacross árg.98 til sølu fyri 18000 kr.
*Tlf. 214130*

**PRUTL TIL SØLU**
Ein RS 50 til sølu fyri kr. 17.000. Ring og hoyr nærri á
*Tlf. 271929*

**SKUTARI TIL SØLU**
Ein Aprilia skutari, 125 kubikk, til sølu. Árgangur 2001, er í rímiliga góðun standi.
*Áhugað kunnu ringja 771010*

**SUZUKI GSX 600**
24.441 km, til sølu.
*Tlf. 211938*

## Teldur

**SERA GÓÐ TELDA TIL SØLU**
Talan er um eina nyggja óbrúkta teldu. 2x480 G-bite Lg 19 t skerm. nyprísur: 14500, nú bert 8000.
*Ring 229883*

**FARTELDA YNSKIST**
Vilt tú selja tína farteldu, so ring til mín á:
*Tlf 251478/349106*

## Tónleikur

**FORSTERKARI TIL SØLU**
Forsterkari av slagnum Roland jazz chorus 77 til sølu fyri 1000 kr.
*Vinarliga ring 508866*

## Út- & Sjónvarp

**BILSTEREO TIL SØLU !**
Bilstereo við fløguspælara til sølu fyri 1000 kr.
*Ring 274213*

## Ymiskt

**NÝTT TAK!**
128 m2, nýtt svart aluminiumstak, 0,7 mm tjúkt, plátunar eru 1 x 4 metrar, í alt 32 plátir, ryggás og seymir fylgja við. selist bert samlað.
*Tlf. 219917*

**BETONGELEMENTIR**
Eg havi nøkur betongelementir til sølu.
*Tlf. 424463*

**ELEKTRISK SKRIVIMASKINA**
Til sølu er ein elektrisk skrivimaskina, AEG Olympia (mini office 60) fyri1200 kr. Er lítið brúkt og í góðum standi.
*Tlf. 310605*

**FLÍSAR TIL SØLU**
Flísar/steinar úttandura 1-2-3-4 til sølu fyri 4000 kr.
*Tlf. 217261*

# HEILSANIR



**Tillukku við degnum**
Hey fitti raski, stóri kúllur. Tillukku við 3 ára degnum Muss og klemm.
**Mamma og babba**



**Tillukku John**
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum, vónandi fært tú nógvar ísar á føðingardegnum.
**Ynskja omma og abbi á Glyvrum**



**Góði elskaði Páll**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum 30. aug. Jesus pápi signi framtíð tína. Vit elska teg.
**Ynskja mamma, babba, Maibrit og Ari**



**Hey fitti John**
Tilukku við 3 ára degnum týsdagin 4. sep.
**Ynskja omma og abbi í Gøtu**



**Hey fitti beiggi**
Tilukku við 3 ára degnum, eg elski teg. Tú ert mín fitti skattur.
**Ynskir stórasystir Sonja**


Sosialurin *Heilsanir* kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur:______________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn:______________________________
Bústaður:______________________________
Bygd/býur:__________________Tlf.:__________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<



Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Tvey starvsfólk til verkætlan í Havn

Søkt verður eftir pedagogum ella fólki við líknandi útbúgving til eina verkætlan undir Trivnaðartænastuni. Størvini verða sett 1. oktober 2007 ella eftir nærri avtalu. Talan er um eitt fulltíðarstarv og eitt hálvtíðarstarv. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við samdøgursog vikuskiftisarbeiði. Vikuskiftisarbeiðið er triðja hvørt vikuskifti.

**Størvini**
Talan er um eina verkætlan, har ein persónur, fyrst í 20'unum, sum hevur autismu, skal læra at skipa sín gerandisdag í egnari íbúð. Í verkætlanini starvast trý fólk í einum toymi umframt avloysarar.

Uppgávan er at virka sum stuðul í gerandisdegnum, og saman við toyminum leggja til rættis og skipa gerandisdagin bæði praktiskt og fakliga.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tey, sum sett verða, hava útbúgving sum pedagogar ella aðra líknandi útbúgving. Ávís servitan um autismu er eisini ein fyrimunur, men hetta er ikki nakað krav.

Tú mást vera sálarliga væl fyri og kunna taka eina professionella støðu og halda fast við hesa. Tú mást duga væl at samskifta og hava evni til at motivera fólk uttan um teg.

**Setanarviðurskifti**
Setanarøkið er Nærverkið, Trivnaðartænastan. Starvið verður lønt sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hannu á Reynatúgvu á tlf. 219040.

Umsókn við hjáløgdum próvskjølum, viðmæli og lívsgongdarlýsing skal sendast til:

**Nærverkið**
Trivnaðartænastan
Eirargarður 2, 2. hædd
100 Tórshavn
Stílað: Jóanes N. Dalsgaard

**Umsóknarfreist: mikudagin 19. september 2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo